Tórshavn, 14. oktober 2020

Hoyringssvar frá Javna

Løgtingsmál nr. xx/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn

Javni takkar fyri høvið at gera viðmerkingar.

Ætlanin er at broyta løgtingslógina frá apríl 2018 um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn. Lógaruppskotið snýr seg um at broyta lógina til bert at fevna um ein bústað, og at lækka fíggjarkarmin frá 58 mió. til 47 mió.

Vit vilja staðiliga mæla til, at hildið verður fast í at byggja báðar bústaðirnir, sum upprunaliga ætlað.

Tað er ovurstórur tørvur á vardum bústaðum til fólk við menningartarni, serliga í Suðurstreymi. Eisini eru flestu av verandi bústøðum í hesum partinum av landinum í ringum standi og ótíðarhóskandi. Hetta sæst millum annað í støðumeting hjá Almannaverkinum frá januar 2020.

Ásannandi stóra tørvin, og tað neyðuga í at gera nakað munagott við støðuna, vórðu 200 mió. settar av í 2017 til vardar bústaðir. Av onkrari orsøk er lítið ítøkiligt enn komið burturúr ætlanunum, alt ímeðan bíðilistin bara leingist. **Sambært tøl frá Almannaverkinum standa 182 fólk á bíðilista til vardan bústað í løtuni, harav um 60-65 hava menningartarn og/ella fjølbrek.**

Á Mýrini í Hoyvík blivu tvey smærri sambýlið tikin niður í 2018, tí tey vóru í sera ringum standi. Búfólkini vórðu flutt í fyribilsbústaðir. Ætlaða nýggja sambýlið skal byggjast á sama stað, og innanfyri karmarnir av omanfyri nevndu lóg. Sambýlið skal verða til 18 fólk, men fyrst og fremst til tey 11, ið búðu har frammanundan. Sostatt ger hetta lítið við bíðilistan.

Aðrar verkætlanir eru ávegis. Ein ætlan er at byggja sambýlið/røktarbústað í Reynstúni á Argjum til 18 fólk, fyrst og fremst til tey, ið búgva í ótíðarhóskandi bústaði á Eirargarði. Ein onnur ætlan er at útvega nøkur búpláss í verandi sambýlum við út- ella umbygging. Hetta útvegar neyvan tíðarhóskandi bústaðir, og eru helst meira at rokna sum fyribilsloysnir, vegna ringu støðuna.

Bústaðarstøðan hjá fólki við menningartarni er katastrofal, og vit mæla staðiliga til at bæði tey ætlaðu sambýlini verða bygd sum skjótast, tí

- **tørvurin á bústøðum til fólk við menningartarni er ovurhánds stórur, og bíðilistin veksur støðugt**
- **60-65 fólk við menningartarni/fjølbreki standa í løtuni á bíðilista eftir bústaði**
- **sambýlið á Mýrini ger lítið við bíðilistan – einans 6 nýggj búpláss**
- **sambýlið í Reynstúni ger einki við bíðilistan – er til tey, ið búgva á Eirargarði**
- **út- og umbygging av verandi gomlum sambýlum útvegar neyvan tíðarhóskandi bústaðir**
- **menniskjaligu avleiðingarnar eru stórar fyri tey, ið bíða eftir bústaði og teirra avvarandi**
- **verandi bústaðir eru í ringum standi og/ella ótíðarhóskandi**

Vit fegnast sjálvsagt um verandi ætlanirnar um at útvega tíðarhóskandi bústaðir til tey, sum í dag búgva í fyribils- ella ótíðarhóskandi bústaði. Men meira ferð má setast á, so at onnur eisini hava møguleika at fáa ein bústað.

Vit heita á politisku skipanina um at taka bústaðartrupuleikan hjá fólkum við menningartarni og fjølbreki í størsta álvara, og um at arbeiða miðvíst og skjótt við at finna munagóðar loysnir at fáa tíðarhóskandi bústaðir til vega, og at fáa bíðilistan burtur.

Vegna Javna

Fía Petersen
dagligur leiðari/forkvinna